# Nípan úr Trongisvági seld til Kanada

**Skipið eitur nú »Lady Dane«, og skal fiska tunfisk í Kanadiskum sjógvi**

SKIPASØLA
*Eirikur Lindenskov*




*Um vikuskiftið fer Nípan tann langa túrin tvørtur um Atlantshavið, gjøgnum Panaveitina til Kanada, har hon skal fiska tunfisk*

*Mynd: Skipalistin*

Í síðstu viku varð garnaskipið Nípan seld felagnum Moffat & Sons Seafoods Ltd. í Vancouver í Kanada. Nípan, sum er 36 metrar til longdar, hevur seinastu tíðina verið nýtt sum vaktarskip í oljuvinnuni í Noreg.

Tað er skipsmeklaravirkið Maretec á Argjum, sum hevur skipað fyri søluni av Nípuni vegna P/F Seta við Viberg Sørensen úr Trongisvági. Hetta er triðja skipið, sum Maretec hevur selt fyri Viberg Sørensen.

Nýggju eigararnir hava kallað Nípuna »Lady Dane«.

Í løguni liggur »Lady Dane« við Vestaru Bryggju í Havn, har nýggju eigararnir fyrireika seg til tann langa túrin tl Vancouver gjøgnum Panamakanalina. Teir fara væntandi avstað í vikuskiftinum, og túrurin fer helst at taka einar 45 dagar.

Tá skipið er komið til Kanada, skal lastin bjálvast til frysting, og skipið verður síðan gjørt út til tunfiskarí, sigur Álvur B. Mortensen á skipsmeklaravirkinum Maretec.

## Filmurin Badding í Norðurlandahúsinum

FILMUR
*Filmsfelagið Klipp*

Mánakvøldið 4. mars klokkan 19:30 sýnir filmsfelag Norðurlandahúsins KLIPP virðislønta finska filmin »Badding«, sum lýsir lívið hjá kendastu finsku rockstjørnuni Raul Somerjoki, nevndur »Badding«.

Filmurin »Badding« fekk í Finnlandi fýra Jussi virðislønir í fjør. Jussi er finska Oscar virðislønin, sum á hvørjum árið verður latin listafólki innan film.

Í 1970 fekk hin veruligi »Badding«, sum nýggi filmurin er um, eisini eina Jussi virðisløn fyri at gera tónleik til film.

»Badding« var stóri kultpersónurin og rokkpoeturin í Finlandi í sjeytiárunum. Filmurin er sanna søgan um stórlæti og fall hansara. Badding doyði bert 39 ára gamal í 1987.

Kendasti finski filmsleikstjórin í mong ár hevur verið Aki Kaurismaki. Men í nítiárunum, tá finska filmsframleiðslan fall til 10-12 filmar um árið, komu eisini aðrir leikstjórar fram. Millum teir fremstu eru Veikko Aaltonen og Markku Pölönen. Hesin seinni er hann, sum hevur leikstjórnað filmin um »Badding«.

Hetta er næstseinatsi filmurin í røðini hjá KLIPP, sum filmsfelag Norðurlandahúsins verður nevnt. Seinasta sýningin hetta skeiðið verður um eina mánað, tá danski dogma-filmurin »The king is alive« verður sýndur.

## Góð undirtøka fyri bústevnuni

VINNA
*Tíðindaskriv*

Fyrireikarnir til bústevnuna Hús og Innbúgv eru sera vælnøgdir við undirtøkuna, fyrsta bústevnan her á landi hevur fingið. Stevnan verður í Runavík í døgunum 3., 4. og 5. mai. Umframt ítróttarhøllina verður eisini eitt stórt tjald leigað heim til endamálið. Hetta gevur eina samlaða útleigingsvídd uppá 1000 fermetrar – og longu nú er væl meir enn helvtin umbiðin.

Fakgreinirnar, sum hava meldað seg til, eru: Timburhandlar, sniðhúsaframleiðarar, byggimeistarar, framleiðarar av vindeygum og køkum, hvítvøruumboð, VHS-innleggjarar, møblar og innbúgv, sjónvarps- og útvarpsútbúnaður, peninga- og fíggjarstovnar og húsameklarar.

Fyrireikarnir vænta, at fleiri greinar fara at melda seg til, og ivast teir ikki í, at allir básarnir eru útleigaðir, tá freistin at melda seg til er úti 8. mars.

Einasta treyt fyri at luttaka er, at fyritøkurnar framleiða ella selja hús og innbúgv, ella tænastur sum hava við hesa vinnu at gera.

Stevnan verður sum sagt 3., 4. og 5. mai, og sleppa vitjandi ókeypis inn.

# Bert 18 næmingar í yngstu flokkunum

**Høgst loyvda næmingatalið í 1. og 2. flokki skal verða 18, meðan tað kann verða 24 í hinum árgangunum, skjýtur Katrin Dahl Jakobsen upp fyri løgtinginum**

SKÚLAMÁL
*Eirikur Lindenskov*



*Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna Javnaðarfloksins hevur lagt fram uppskotið um at avmarka næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum*

– Fleiri dømi eru um, at næmingatalið í fólkaskúlaflokkunum er oman fyri 24, sum er ásett í fólkaskúlalógini sum evsta mark. Grein 20 í fólkaskúlalógini sigur, at vi skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24, men henda orðing er ov lítið avmarkandi, sigur Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna Javnaðarfloksins.

Hon heldur, at her verður bæði latið upp fyri at tulka, hvat er vanligt og ikki, umframt at næmingatalið í flokkunum kann vaksa upp um tey 24 eftir skúlaársbyrjan.

– Júst hetta er gondin, ikki bara í trongu skúlunum í Havn, men eisini í skúlunum á bygd. Hækkandi næmingatalið í flokkunum ger, at lærarar hava alt ov lítla tíð til einstaka næmingin, heldur Katrin Dahl Jakobsen. Hon heldur, at sum tongdin er nú, flyta vit okkum longur og longur burtur frá næmingalagaðari undirvísing, við uppaftur størri vanda fyri, at bert miðjan fær sum mest burturúr. Hon heldur eisini, at tað verður ring at geva bókliga veika eins og sterka næminginum røttu undirvísingina og røttu avbjóðingina í stórum flokki.

– Harafturat hevur uppalingarligi parturin av lærarayrkinum verið vaksandi, og tíðin hjá lærarunum verður mangan smábýtt.

Katrin Dahl Jakobsen sigur, at hetta serliga kemur til sjóndar fyrstu skúlaárini, tá næmingarnir hava fyri neyðini, at lærarin er nógv um tey. Ein trygg og miðvís innskúling slóðar fyri góðari skúlagongd, heldur hon.

Hava næmingarnir fingið eina góða byrjan, eru størri útlit fyri, at væl fer at hilnast. Tí skýtur Katrin Dahl Jakobsen upp vegna Javnaðarflokkin, at næmingatalið í fólkaskúlaflokkum tvey tey fyrstu skúlaárini verður hægst 18, og at til ber ikki at fara upp um 24 í hinum árgangunum, uttan so at serlig viðurskifti vísa seg, og at landsstýrismaðurin gevur loyvi til tess.



*Javnaðarflokkurin ynskir, at eitt púra greitt mark skal vera fyri, hvussu nógvir næmingar skulu kunna vera í flokkunum. Sum er nú er hetta marki alt ov ógreitt, sigur Katrin Dahl Jakobsen*



# –Vit eru klárir

**-at fara á London Stock Exchange, men bíðað verður eftir, at allar umstøður eru klárar sigur Niels Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni**

OLJUFELAG OG PARTAPENINGUR
*Jan Müller*



*Niels Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni veit enn ikki, nær teir fara á virðisbrævamarknaðin í London*

Oljufelagið Føroya Kolvetni hevur nú útsett ætlanina at fara á virðisbrævamarknaðin í London nakrar ferðir. Endamálið er annars at útvega sær stórar peningaupphæddir fyri at kunna vera við í fyrstu boringini hjá Agip í Føroyum, sum eftir ætlan skal byrja í heyst. Henda ætlan er nú útsett nakrar ferðir m.a. orsakað av órógv á altjóða partabrævamarknaðinum. Eitt nú gjørdi hendingin í New York 11. september so stóran vørr, at felagið metti tað vera rætt at útseta børsnoteringina til í februar í ár, ella neyvari til 28. februar. Nú upplýsir Niels Sørensen, stjóri í felagnum, at hetta varð so av ongum, men at teir eru so gott sum klárir. Nú verður bíðað eftir, at allar umstøður eru komnar uppá pláss.

Ein partur er av hesum er uttan iva spurningurin um nær og um samtakið er klárt at fara undir boring sum ætlað. Ein annar partur er, um marknaðurin í løtuni er tann rætti, og nær hann er tað.

Endamálið við at fara út á "London Stock Exchange" er at fáa umleið 180 mill. kr. í nýggjum partapeningi, sum skal fíggja luttøkuna í komandi boring. Í løtuni hevur Føroya Kolvetni 7% lut í loyvinum, men ætlanin er at hækka henda partin til 22%.

Uppá fyrispurning um møguleiki er fyri, at Agip vil bíða við boringini til í næsta ár, og at Føroya Kolvetni av tí sama vil bíða við at fara á virðisbrævamarknaðin sigur Niels Sørensen, at tað dugir hann ikki at siga enn. So langt hava teir ikki hugsað.

Tað er tó greitt, at verður eingin boring í ár, so verður heldur ikki farið á London Stock Exchange nú. Tað skal helst ikki ganga meira enn eitt hálvt ár frá tí , at man er farin á børsin til tað verður borað. Um ov lítið hendir, so minkar virðið á partabrøvunum, og tað ynskja investorarnir sjálvandi ikki.

*–Men hava tit ikki ein trupulleika ikki at vita, nær og um Agip fer at bora?*

–Vit fara ikki á børsin, uttan at allar fortreytir eru greiðar. Men vit bíða nú eftir at fáa grønt ljós á rætta stað til at fara undir at tekna meiri partapening.

Niels Sørensen sigur tó, at sum støðan er nú, so hevur einki verið frammi um, at tað ikki verður borað sum ætlað.

Herfyri stóð í einum av bløðunum, at Føroya Kolvetni og Agip høvdu ikki gjørt av, hvar tey fóru at bora, tí tey bíðaðu eftir úrslitinum av kanningunum hjá Amerada Hess, sum Hess skal lata myndugleikunum í august. Sosialurin skilur, at her er okkurt komið skeivt fyri. Tað er ikki hetta bíðað verður eftir men eftir data frá boringini í fjør, sum øll feløgini, ið eru á Føroyaøkinum hava avtalað skulu latast hvørjum øðrum. Tvs. at talan er um sjálvar brunnupplýsingarnar.

*Hvørja ávirkan fer tað at fáa fyri Føroya Kolvetni, um so er, at Agip ger av at bíða við boringini til í næsta ár?*

Niels Sørensen: –Vit mugu bara bíða við. Vit gera ikki av, nær borað verður.

*–Men hvat skulu tit tá liva av, skulu tit ikki fara á børsin nú?*

Niels Sørensen sigur, at felagið er ikki dýrt at reka, og hartil hava teir møguleika at fara í gongd við onnur ting, at "farma" inn ol. – Bara at sita og bíða er eitt sindur keðiligt leggur hann aftrat. Men ráð verða fyri tí.

Frá Kirkjutorginum - Klaksvíksvegur 85

**Stór útsøla byrjar mánadagin 4. mars**

* Christ is King klæðir -30%
* Deyðahavs krem til hann og hennara -30%
* Útvaldar fløgur frá kr. 75,- stk.
* Allar rammir -20%
* Ymiskar bøkur -20%

*Annars er handilin fullur av uppbyggiligum lesnaði, bæði fyri smá og stór*
*Kom tí inn á gólvið á Klaksvíksvegi 85!*

*Handilin, ið selur alt av kirkjuligum lutum og kristnum bókmentum*
*Opið allar dagar frá 13.00-17.30*
*og leygardag frá 10.00-12.30*
*tlf. 456559*

Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 AUTOM.** Skrás.: 07-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 182.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 1,3 STATION** Skrás.: 27-09-95 Km.: 107.000 Prísur: 73.600,- (Sýnaður 11-00) |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL AUT. GEAR** Skrás.: 19-05-98 Km.: 17.000 Prísur: 158.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 1,6 SEDAN** Skrás.: 25-01-99 Km.: 52.000 Prísur: 116.600,- Garanti** |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 TD** Skrás.: 19-08-99 Km.: 111.000 Prísur: 148.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 14-01-98 Km.: 131.000 Prísur: 113.600,- Garanti* |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 TDI** Skrás.: 29-04-99 Km.: 82.000 Prísur: 154.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA** Skrás.: 22-07-98 Km.: 53.000 Prísur: 99.600,- Garanti* |
| **TOYOTA AVENSIS 1,8 TERRA** Skrás.: 04-06-98 Km.: 46.000 Prísur: 144.600,- Garanti* | **TOYOTA YARIS 1,0 SOL** Skrás.: 02-02-01 Km.: 17.000 Prísur: 130.600,- Garanti** |
| **TOYOTA CARINA 2,0 TD** Skrás.: 15-08-97 Km.: 106.000 Prísur: 119.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,7 DIESEL** Skrás.: 31-03-94 Km.: 176.000 Prísur: 58.600,- (Sýnaður 02-01) |
| **TOYOTA CARINA 1,6 L/B** Skrás.: 08-04-97 Km.: 83.000 Prísur: 95.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,6 STW.** Skrás.: 01-04-98 Km.: 82.000 Prísur: 115.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA 1,6 XLI** Skrás.: 12-06-96 Prísur: 89.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,7 TDI STW.** Skrás.: 18-06-97 Km.: 135.000 Prísur: 87.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA 1,6 L/B** Skrás.: 10-04-96 Km.: 72.000 Prísur: 98.600,- Garanti* (Sýnaður 10-00) | **FORD ESCORT 1,6 CLX** Skrás.: 04-07-95 Km.: 98.000 Prísur: 56.600,- |
| **TOYOTA CARINA 1,6 SED.** Skrás.: 20-12-95 Km.: 103.000 Prísur: 86.600,- Garanti* (Sýnaður 09-01) | **CITROEN ZX** Skrás.: 24-05-95 Km.: 57.000 Prísur: 64.600,- (Sýnaður 04-01) |
| **TOYOTA COROLLA 1,4 TERRA** Skrás.: 18-04-01 Km.: 7.000 Prísur: 145.600,- Garanti** | **SUZUIKI ALTO 1.0** Skrás.: 21-09-98 Km.: 31.000 Prísur: 63.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B** Skrás.: 15-06-98 Km.: 32.000 Prísur: 118.600,- Garanti* | **FORD SIERRA 1,8 DIESEL** Skrás.: 28-11-91 Km.: 217.000 Prísur: 38.600,- |

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN

** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

VØRUVOGNAR

**MAZDA E 2200 4X4 VØRUVOGNUR** Skrás.: 14-10-96 Km.: 69.000 Prísur: 98.600,- (Sýnaður 11-00)

STØKK INN Á GÓLVIÐ

REYNI SERVICE

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820